# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Incra Sp/f:

## Nýtt føroyskt produkt

**Hósdagin í síðstu viku var móttøka hjá AutoService við Oyggjarvegin í Havn í samband at eitt nýtt føroyskt produkt, „Shiny Wheels“ at reinsa felgur við, er komið á marknaðin**

MÓTTØKA
*Myndir: Magnus Gunnarsson*



*Stjórin í Incra Sp/f, Regin W. Dalsgaard, spular her eina felgu, ið er reinsað við Shiny Wheels*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Hjá teimum sum hava almikið stríð av at halda felgurnar á bilinum reinar, er gott nýtt at frætta. Eitt nýtt føroyskt produkt er komið á marknaðin, sum loysir hendan trupulleika til fulnar.

Talan er um Shiny Wheels, ið er ein nýggj føroysk vøra, ið er framleidd til at reinsa felgurnar á bilinum við. Tað er fyritøkan Incra Sp/f v. Regin W. Dalsgaard, sum stendur fyri hesi verkætlan, ið er gjørd saman við Kemilux.

Undir móttøkuni var møguleiki fyri at royna nýggju vøruna. Fólk vóru vælkomin at hava bilin við og royna hvussu Shiny Wheels virkar. Fleiri nýttu høvi og fingu felgurnar reinsaðar við sera góðum úrsliti. Shiny Wheels skal bert sproytast á felgurnar og síðan skolast av aftur aftan á 3 minuttir.

Nógv er gjørt burtur úr at spraydunkarnir skulu síggja atraktivir út og vera lættir at handfara. Framleiðslan verðuir gjørd saman við Kemilux, og í Føroyum verður tann lidna vøran seld gjøgnum Poul Michelsen. Annars er Shiny Wheel serliga ætlað til útlendska marknaðin, í fyrsta umfari Danmark og Ísland.

## Andlát og jarðarferðir

Gunleigur Poulsen, Klaksvík, ættaður úr Kunoy, andaðist týsdagin 31. januar, 77 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

Kistan við **Johannu Eivindson, Nes Hvalba**, fer úr kapellinum á Suðuroyarsjúkrahúsi fríggjadagin kl. 18 úr Hvalbiar Kirkju. Jarðarferðin verður leygardaginkl. 13. Sungið verður úr Sálmabókini. Tey, sum vilja minnast Johannu, kunnu lata eina peningagávu til Suðuroyar Ellis- og Røktarheim, konta í Føroya Sparikassa.

Kistan við **Elken Petersen, Klaksvík**, fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi mikudagin klokkan 18. Jarðarferðin verður hósdagin klokkan 13 úr Krstianskirkjuni.

Kistan við **Vilhelminu Hansen, Fuglafjørður**, fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum hósdagin 2. februar kl. 18. Jarðarferðin verður úr Fuglafjarðar Kirkju fríggjadagin 3. februar kl. 13.

**Hákun Joensen, Saltangará**, vanliga nevndur Hákun á Líknagøtu, andaðist í heiminum 30. januar, 73 ára gamal. Kistan fer úr heiminum í Glyvra kirkju týskvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður hósdagin klokkan 13.

Salong Liljan:

## Hárlitir uttan ammoniakk

**Salong Liljan í Havn hevði í vikuskiftinum 28. og 29. januar vitjan av Ditte og Tanja frá Danhair. Skeiðið var um ammoniakkfríar litir. Áhugavert var at hoyra um og royna tær nýggju hárfarvurnar**

TÍÐINDASKRIV



Litirnir vórðu royndir á 15 modellum, sum allar vóru flottar og blankar eftir viðgerðina. Eisini vóru modellirnar sjálvar væl nøgdar.

Leygardagurin byrjaði við at Ditte og Tanja fyrireikaðu seg til skeiðið kl. 15.

Tær byrjaðu kl. 10 at fyrireika modellirnar við at lita og klippa. Hóast hvør modell fekk eina stóra viðgerð, var hárið bæði sunt og bleytt aftaná.

Á skeiðnum vóru hárfríðkarar, ið vóru heilt seldar í litunum, ikki bert tí modellirnar vóru flottar og blankar, men eisini tí tað er gott hjá hárfríðkararunum at arbeiða við. Eingin sterkur ammoniakkluktur, men „behagiligur“ fruktluktur, sum ikki skaðar hárfríðkarar, sum standa og arbeiða við litunum til dagligt. Sjálvt bleikingin luktaði væl, og er uppbygd av leiður, og tað kann bleikja.

Sunnudagin byrjaðu vit við modellum, sum hárfríðkararnir sjálvar sluppu at royna litirnar á, og tað føldist væl. Eingi eygu sum runnu í vatn, ei heldur nakar sterkur luktur, sum man má venda sær frá

Nei, endiliga nakað gott til hárfríðkarar at arbeiða við.

Allir hárfríðkararnir vóru sera áhugaðar í litunum, og í framtíðini fer tað at breiða seg nógv við ammoniakfríum litum. Tað er betur fyri øll sum lita hár, bæði fyri allergikarar og konufólk, sum eru við barn, og øll hini sum einki feila.

Tað besta av øllum er, at tú fært eitt lekkurt bleyt hár aftaná viðgerðina, siga hárfríðkararnir, sum vóru á skeiðnum.



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin